POLITIKKUR

Stovna nýggjan flokk til næsta løgtingsval



Hallur Hjalgrímsson Djurhuus, vinstrumegin, er stigtakari til nýggja flokkin, sum hevur eitt einasta endamál og hann ætlar sær sjálvur at stilla upp. Arnfinn á Birtuni, høgrumegin, verður væntandi eisini eitt av valevnunum

NÝGGJUR FLOKKUR Flokkurin er ikki politiskur í vanligum týdningi, men hevur bara eitt einasta endamál

Áki Bertholdsen

Tað er nógv, sum bendir á, at tá ið løgtingsval verður aftur, fáa vit ein flokk afturat at velja ímillum.

Løgtingsval verður aftur í seinasta lagi 31. august næsta ár, og nú er farið undir at savna tær neyðugu undirskriftirnar, sum skulu til, fyri at sleppa at stilla upp við einum nýggjum flokki.

Talan er ikki um ein politiskan flokk í orðsins vanliga týdningi, tí flokkurin hevur bara eitt einasta mál á dagsskránni.

Og tað er at kannabis skal lógligt í Føroyum.

Áhugafelagið, sum hevur tikið stig til nýggja flokkin, kallar seg »Framtakið fyri rættinum at velja kannabis«

Fyri at kunna stilla upp til løgtingsval, skulu tey hava 800 undirskriftir frá veljarum, sum taka undir við, at tey stilla upp.

Stigtakararnir siga, at higartil hava teir fingið upp ímóti 150 undirskriftir, men tað er ikki fyrr enn nú, at tey rættiliga eru farin undir arbeiðið at savna inn undirskriftir. Fyrsta tiltakið í hesum sambandi var á Pubbini á Tvøroyri leygardagin, har tey eisini fingu nøkur fólk at skriva undir.

Nú ætla tey sær at ferðast kring landið at savna inn undirskriftir og ætlamin er eisini at fara á Tórsfest, og kanska eisini á onnur tiltøk, har nógv fólk er savnað, at fáa fólk at skriva undir upp á, at tey kunnu stilla upp.

– Tey, sum skriva undir, váttað einans, at vit skulu fáa rætt til at stilla upp, leggur stigtakarin til nýggja flokkin, Hallur Hjalgrímsson Djurhuus.

– Tey skriva sostatt ikki undir upp á, at tey eisini skulu velja okkum, leggur hann afturat.

Og hann er rættiliga bjartskygdur, tí hann heldur ikki, at tað er heilt veruleikafjart, at tey fara at fáa tvey umboð á Føroya Løgting, tí tað er hjá rættiliga nógvum fólkum, at tað er eitt hjartamál, at kannabis skal vera lógligt í Føroyum.

Sjálvur ætlar Hallur Hjalgrímsson Djurhuus sær at stilla upp fyri nýggja flokkin, og nógv bendir á, at eitt annað valevni verður Arnfinn á Birtuni, sum í nógv ár hevur verið heitur talsmaður fyri at gera kannabis lógligt í Føroyum.

Hava bara eitt endamál

Hallur Hjalgrímsson Djurhuus sigur, at talan er um ein flokk, sum ikki hevur eitt politiskt endamál í vanligum týdningi.

– Vit fara til val upp á eitt einasta mál, og tað er at kannabis skal vera lógligt í Føroyum, sigur hann.

Hann leggur afturat, at í øllum øðrum, politiskum málum, verður støða tikin frá máli til mál.

Men Hallur Hjalgrímsson Djurhuus leggur dent á, at tá ið tey tosa um at kannabis skal vera lógligt, merkir tað ikki, at endamálið er at tað skal fáast til keyps á hvørjum horni.

– Vit hugsa fyrst og fremst um, at tað skal vera púra lógligt hjá sjúklingum at fáa kannabis til medisinska nýtslu, sigur hann.

Hann tvíheldur um, at tað er skeivt, tá ið læknar og onnur, føra fram, at tað ber til at fáa kannabis til medisinska nýtslu í Føroyum.

– Í heilt ávísum førum ber tað til at fáa heilivág við einstøkum úrdráttum úr kannabis í, men tað er ikki nøktandi eftir okkara tykki, tí tað eru yvir 100 evni í kannabis, og tað eru øll evnini í kannabis, sum tilsamans geva tann linnandi virknaðin, sigur hann.

Hann leggur afturat, at fólk skulu endiliga ikki trúgva honum treytaleyst, men hann heitir tvørtur ímóti á fólk um at leita á internetinum eftir tilfari um kannabis sum heilivág, tí so kunnu tey gera sínar egnu niðurstøður.

– Men eitt, sum aftur og aftur verður ført fram um kannabis, er, at tað er ikki ganskað nógv væl. Hetta er beinleiðis skeivt, tí kannabis er granskað í áratíggjur og í roynd og veru eru tað ikki nógv evni, sum eru so væl granskað um nettupp kannabis. Serliga í Ísrael hava tey gingið undan á hesum øki í áratíggjur, leggur hann afturat.

– Og tað hevur avgerandi týdning, at eisini vit fáa umboð á Føroya Løgtingi, so at vit fáa sett kannabis á politisku dagsskránna, á jøvnum føti við fiskivinnu, samferðslu, og øll onnur mál, sigur stigtakarin til nýggja flokkin.

Kannabis til fólkið

Hallur Hjalgrímsson Djurhuus staðfestur kortini, at hóast tey fyrst og fremst hugsa um at gera tað lógligt at at fáa kannabis til medisinska nýtslu, er tað – í longdini – eisini endamálið at virka fyri, at kannabis verður lógligt, sum so.

– Men tað skal vera undir eftirlitið. Vit halda framvegis ikki, at tað skal vera loyvt at selja hassj á hvørjum geilarhorni, men vit halda, at fólk skulu skulu sleppa at hava sínar egnu kannabis-plantur til egið brúk, sigur hann.

Hann heldur eisini, at sum frálíður eigur kannabis eisini at verða at fáa í úrvaldum handlum, kanska á apotekinum og í Rúsuni.

Arnfinn á Birtuni, sum eisini var við í átakinum, sigur, at ein stórur trupulleiki við svarta kannabis marknaðinum er, at ongin vørulýsing er á tí. Verður tað hinvegin selt undir skipaðum viðurskiftum, hava vit trygd fyri at vøran er í lagi.

– Okkara endamál er at gera kannabis lógligt í Føroyum og at taka avgerðarrættin yvir kannabisplantuni úr hondunum á politikarunum, landslæknanum og landsapotekarunum, og leggja hana í hendurnar á fólkinum, sigur Hallur Hjalgrímsson Djurhuus.



Leys størv á Landssjúkrahúsinum

5 KBU størv
Umsóknarfreist 25. juli 2018

Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til Psykiatrisku deild
Umsóknarfreist 23. Juli 2018

Sjúkralingasamskipari til Uttanlandstænastuna
Umsóknarfreist 19. Juli 2018

Sjúkrarøktarfrøðingur til B6
Umsóknarfreist 23. Juli 2018

Fysioterapeutur til Fysioterapideildina
Umsóknarfreist 23. Juli 2018

Kliniskur útbúgvingarsamskipari til sjúkrarøktarfrøðilesandi í sjúkrahúsverkinum
Umsóknarfreist 22. Juli 2018

Sjúkrarøktarfrøðingur til reumatologiskt ambulatorium.
Umsóknarfreist 25. Juli 2018

Ljósmóðir til Føðideildina
Umsóknarfreist 27. Juli 2018

Starvsfólk til Kafeina
Umsóknarfreist 31. Juli 2018

Læknarskrivarar til Skurðdepilin
Umsóknarfreist 26. Juli 2018

Les meira og sí fleiri størv á www.ls.fo